gult cyan magenta svart

Reyði Krossur leitar eftir myndum

Reyði Krossur í Føroyum sóknast eftir myndum til minningarrit, sum skal koma út til 75 ára stovningardagin tann annan apríl

ÁHEITAN

Reyði Krossur í Føroyum sóknast eftir myndum, sum hava við arbeiði felagsins at gera. Myndirnar eru ætlaðar at brúka í einum minningarriti, sum ætlandi skal koma út til 75 ára stovningardagin hjá Reyða Krossi í Føroyum tann annan apríl í ár.

So tað er ikki tann nógva tíðin at savna myndir í, skilst.

Tað er soleiðis, at arbeitt verður í løtuni við at gera tekstin til minningarritið lidnan. Men tað vísir seg, at Reyði Krossur eigur sera lítið av myndatilfari, sum vísir til arbeiðið hjá felagnum hesi 75 árini.

Tí heitir felagið á fólk um at hjálpa til við at fá myndir til vega, sum hava eitthvørt tilknýti til Reyða Kross, persónar, sum hava havt við felagið at gjørt hesi árini, ella hendingar, sum á einhvønn hátt kunnu setast í samband við Reyða Kross. Tað verið seg innsavningar, uppseting av bjargingarkransum, luttøka á skeiðum, ella hvat tað nú skal vera.

Tey, sum hava onkra mynd, sum so ella so kann setast í samband við Reyða Kross, verða vinarliga biðin um at lána felagnum tær. Tær verða latnar eigaranum aftur.

Adressan hjá Reyða Krossi er:
Reyði Krossur í Føroyum, Postboks 1015
110 Tórshavn

Eisini ber til at venda sær til Suna Vinther í Tórshavn, sum síðan kann fáa myndirnar upp á pláss.

Suni Vinther er at hitta á tlf. 31 30 81, ella á skrivstovuni hjá Reyða Krossi, sum hevur tlf. nr. 31 96 30

ej

Fyrsta smálambið komið

FRÁBRIGDI
Áki Bertholdsen

Vit plaga at siga, at tá ið fremstu teknini um, at tað várið er komið og at summarið er í hond, tað er, tá ið smálombini koma.

Um tað er eisini er so í hesum føri, skal vera ósagt. Men í øllum førum er ársins fyrsta smálamb longu komið.

Tað er ein ær hjá Hermund Hammer í Hvalba, sum longu hevur lembt.

Tað var týsdagin, at tey gjørdu stór eygu, tá ið tey fóru at hyggja eftir ærini, tí undir liðini á henni gekk eitt nýlembt, nossligt veðurlamb. Tey høvdu ikki ansað eftir, at ærin var kvigin, so hetta var heilt óvæntað.

Ærin hevur nóg mikið at geva, so tað er ongin orsøk til at taka lambið frá henni, sigur eigarin.

Ærin, sum eigur lambið, má sigast at vera ein sjáldsom ær. Hon var heimalamb og er nú trævut. Tá ið hon var tvævut í 1999, kom hon eisini í bløðini, tí tá lemdi hon tvær ferðir. Fyrru verð, hon lembdi í 1999, var 12. apríl og aðru ferð var 16. oktober. Fyri hetta "bragdið" er ærin komin í ta føroysku metbókina.

Í fjør lembdi hon sum vanligt, tann 29. mai.

Men týsdagin lembi hon so aftur. Hon er blivin brundað ímeðan hon gekk inni á eini trøð í heyst, har veðrur eisini varð inni, veðrurin var heimalamb.

Hermund Hentze og tey eru von at gera væl við seyðin og uttan at hava orðið á teimum má ásannast, at tey hava vanliga sera góðan seyð. Tann, sum vil hava hetta váttað, kann minna seg aftur á seyðasýningar, sum hava verið, tí har haðani hava tey ein hóp av steypum.



BÍBLIA
Kápa: Edward Fuglø
Stødd 125 x 195 mm.,
1211 síður
ISBN 87-7523-421-1
Kostnaður 150,- kr.

BÍBLIA
Í svørtum leðurlíki við gullskurði
Stødd 125 x 195 mm.,
1211 síður
ISBN 87-7523-423-8
Kostnaður 250,- kr.



BÍBLIA
Í lummastødd
Í svørtum leðurlíki
við dragulási
Stødd 105 x 164 mm.,
1211 síður
ISBN 87-7523-425-4
Kostnaður 200,- kr.

BÍBLIA
Ríkisbíblia og ættarbíblia
Í stórari stødd.
Myndprýtt hevur hennara hátign Margreta drotning II
Stødd 215 x 304 mm.
við gullskurði,
1211 síður
ISBN 87-7523-428-9
Kostnaður 600,- kr.


óreinskapi og ólevnaði og ó
sum teir hava havst við.

Paulus fúsur at fara strangli teimum seku, men vónar, at skal gera tað óneyðugt

13 Hetta er nú triðja ferð tykkara. Eftir munni av tve trimum vitnum skal hvør se
2 føst. 1 Eg havi sagt tað fyrr o eins og tá ið eg var hjástadu sinni, soleiðis nú tá ið eg er

BÍBLIAN
- Úrvalssøgur
Úrvaldir bíbliutekstir til børn og vaksin við 50 heilsíðumyndum hjá Esben Hanefelt Kristensen
Stødd 200 x 235 mm.,
302 síður
ISBN 87-7523-427-0
Kostnaður 150,- kr.



Nýggja Bíblian er at fáa í bókahandlunum

BIBELEN PÅ CD-ROM
Dansk/Færøsk/Grønlandsk
Í 3. útgávu eru framvísari og leitiforritið Bókaskápið og ein bókahill við elektron-isku bókunum hjá Bíbliufelagnum:
Bibelen med De Apokryfe Bøger (1992/98)
Det Nye Testamente (1948)
Bíblia. Halgabók (1961/37) Biibili
ISBN 87-7523-437-8
(Windows)
Kostnaður 575,- kr.

Tórbjørn gevur út nýtt blað

Tórbjørn Jacobsen, sum eisini er landsstýrismaður í mentamálum, hevur stovnað partafelag, sum hevur til endamáls at geva út blað og annað starv í hesum sambandi

BLAÐÚTGÁVA
John Johannessen

Føroyingurin kann skjótt vænta sær enn eitt føroyskt tíðindablað á handilshillunum.

Tað er sjálvur landsstýrismaðurin í mentamálum, Tórbjørn Jacobsen, sum eigur partapeningin í nýggja smápartafelagnum, Sproti, sum hevur til endamáls at reka blaðútgávu og annað starv í hesum sambandi.

Hetta sæst í lýsing frá Skráseting Føroya í bløðunum 23. januar í ár.

Dótturfelag

Sproti er eitt dótturfelag, hjá partafelagnum Kongshavnar Útgerðarfelag, sum Tórbjørn Jacobsen eigur saman við pápa sínum, Jóan Jacob Jacobsen.

Talan er um eitt rættuliga sterkt felag. Partapeningurin í móðurfelagnum er 1 millión og túsund krónur. Av hesum eigur Tórbjørn Jacobsen hálva millión í A partabrøvum, Jóan Jacob Jacobsen eigur somuleiðis hálva millión í A partabrøvum, og at enda eigur Bjørn á Heygum túsund krónur í B partabrøvum.

Partapeningurin í smápartafelagnum Sproti, sum varð stovnað 8. januar, er 80.000 krónur.

Stjóri í nýggja felagnum er Jonhard Mikkelsen úr Vestmanna. Sum Sosialurin skilir, skal hann eisini vera stjóri fyri blaðnum.

Vikublað

Sosialurin hevur tosað við Jonhard Mikkelsen, sum verður stjóri á nýggja blaðnum. Men hann vil ikki siga nakað um ætlanirnar við blaðnum enn.

– Ætlanin er komin so stutt enn, at eg veit einki at siga tær um blaðið, er viðmerkingin frá Jonhard Mikkelsen.

Men Sosialurin hevur frá fleiri keldum, sum eru við í ætlanini, fingið at vita, at talan verður um eitt vikublað, sum skal koma út hvønn leygardag. Blaðið skal ikki vera beinleiðis politiskt heft, men tað skal vera eitt samfelagsligt og mentanarligt kjakforum hjá teimum, sum taka undir við føroyskum fullveldi.

Tórbjørn Jacobsen vil ikki koma við viðmerkingum um nýggja blaðið. Hann sigur, at nevndin hevur gjørt av, at tað bert er blaðstjórin, Jonhard Mikkelsen, sum meldar út vegna felagið.

Tað er partafelagið hjá Tórbjørn Jacobsen, Kongshavnar Útgerðarfelag, sum eigur partapeningin í nýggja felagnum, sum fer at geva út nýtt tíðindablað

Myndviðgerð: Álvur Haraldsen

Tingfólk ørkymlað um fólkaatkvøðuna

Fleiri tingfólk royndu á tingfundinum í gjár at fáa nærri greiðu á, hvat fólkatkvøðan í apríl skal snúgva seg um. Men tað bar ikki til hjá løgmanni at greiða nærri frá ætlanini

FÓLKAATKVØÐAN
John Johannessen

Nær fyriliggur eitt uppskot til, hvat føroyingar skulu taka støðu til á fólkaatkvøðuni í apríl, hvat skal standa á atkvøðuseðlunum og hvussu drúgva tíð fáa vit at fyrireika okkum?

Hesar spurningar nýttu tingfólk høvið at spyrja, tá munnligir fyrispurningar vóru á dagsskránni fyri tingfundin mikudagin.

Tingfólk fingu kortini ikki nógv meira at vita, enn tey longu vistu frammanundan.

Páll á Reynatúgvu úr Tjóðveldisflokkinum, vísti á, at tingformaðurin í Sjónvarpinum týskvøldið vísti á, at eitt lógaruppskot um fólkaatkvøðuna helst skal koma fyri tingið í næstu viku, um fólkaatkvøðan skal haldast í apríl. Tí spurdi Páll á Reynatúgvu løgmann, nær eitt slíkt uppskot fyriliggur.

Men løgmaður segði seg ikki kunna svara hesum. Hann gjørdi greitt, at eitt uppskot skuldi koma fyri tingið so skjótt, sum landsstýrið var liðugt at viðgera málið, og so skjótt, sum ein avtala er fingin í lag við danir.

Jenis av Rana úr Miðflokkinum spurdi løgmann, hvat skal standa á atkvøðuseðlunum.

Heldur ikki hetta bar til at fáa at vita. Løgmaður vísti í svari sínum til leistin, sum landsstýrið kunngjørdi 2. november, og greiddi frá, at støða skal takast til eina koyriætlan fram móti suverenitetinum.

Lisbeth L. Petersen úr Sambandsflokkinum spurdi løgmann, hvussu langa tíð, Føroya fólk kunnu vænta at fáa at kunna seg um uppskotið, áðrenn farast skal til fólkaatkvøðu.

Svarið frá løgmanni var, at tíðarbilið helst ikki skal vera styttri enn tríggjar mánaðir. Hann vísti í sama sambandi á, at kjakið um tíðarbilið eisini hevur samband við, nær eitt uppskot um fólkaatkvøðuna kemur fyri løgtingið.

Miðnámsskúlin seinkaður:

Javnstøðunevndin vrakað bygginevnd

SKÚLABYGGING
John Johannessen

Javnstøðunevndin hevur vrakað samansetingina av bygginevndini, sum skuldi fyrireika nýggjan studentaskúla í Vági.

Landsstýrismaðurin í skúlamálum, Tórbjørn Jacobsen, hevði annars ætlað, at nevndin skuldi setast tíðliga í januar, so ein nýggjur studentaskúli í Vági kundi fyrireikast sum skjótast.

Men tá samansetingin av nevndini tíðliga í januar varð send Javnstøðunevndini til ummælis, varð hon vrakað.

Landsstýrismaðurin og umsiting hansara metasamansetingina av nevndini vera neyðuga, sum tey hava valt hana. Tí hevur Undirvísingar- og Mentamálastýrið sent Javnstøðunevndini áheitan um at gera frávik í hesum føri. Javnstøðunevndin viðger í løtuni umsóknina.